# Politistur

**Eitt arbeiði við avbjóðingum**

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur íkemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at gjaldandi reglur verða hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgaranum.*

**Eitt arbeiði allan sólarringin**

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.



Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er allatíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

**Løn og útbúgving**

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiðið – fast starv sum politistur.

**Menning og karriera**

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



**Ynskir tú at vera við?**

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelagnum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði – og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

**Meira kunning**

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

Føroya Landfúti
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 14 48 Fax 31 82 66
Heimasíða: www.politi.fo

**Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. 4 politistar skulu setast í ár. Umsóknarfreistin til hesar upptøkuroyndirnar er 20. mars 2000.**


**Aðalfundur í Atlants Kolvetni**

Atlants Kolvetni hevur aðalfund fríggjadagin 31. mars kl. 17.00 á Hotel Föroyum.

- Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári.
- Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
- Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda roknskapin og ársfrágreiðing.
- Val av nevnd.
- Val av grannskoðara, ið situr til næsti vanligi ársaðalfundur er lokin.
- Uppskot til broyting í §2 stk 3 nr. 1 í viðtøkum felagsins, soleiðis at persónar, sum í einum samanhangadi tíðarskeiði á 1 ár seinastu 20 árini lúka treytirnar í nevndu grein, kunnu gerast partaeigarar í felagnum.
- Mál, ið nevndin ella partaeigararnir ynskja til viðgerðar.

Atlantic Petroleum

Bryggjubakki 4 • Postrúm 1228 • 110 Tórshavn
Tlf. 350 100 • Fax 350 101 • www.petroleum.fo

**Reyði krossur Føroya**

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. 17[00] til 23[00]

☎ 212380

**Røktar- & Umlættingarheimið**

*Lágargarður*

**søkir eftir summarfrítíðar-avloysarum**

**Fyri røktarstarvsfólk:**
Sjúkrasystrar og sjúkrahjálparar/sosial- og heilsuassistentar. Somuleiðis eisini assistentar til køkin at avloysa í tíðini frá 1. juni til 31. august 2000 ella sambært avtalu.

Lønin er sambært avtalu ímillum avvarðandi yrkisfeløg og Føroya Landsstýri.

Umsóknarfreistin er til 29. mars 2000.

Skrivlig umsókn við neyðugum prógvum skal sendast til leiðaran á

**LÁGARGARÐI**
**Stoffalág 84**
**Boks 1188**
**110 Tórshavn**

**MáF aðalfundur**
**verður í SJÓNLEIKARHÚSINUM í Havn leygardagin 15. apríl kl. 10.**

Dagsskrá samb. lógini
Nevndin
*heimasíða: www.maf.fo*

**Lastbilur til sølu**

MAN 8 tons, 150 HK við skiftilast, krana og komprimator.

**Tlf. 447959 ella 217181**

*Lýsið í* **sosialinum**





# Fíggjarleiðari

***Søkt verður eftir fíggjarleiðara til P/F FØROYA BANKA***

***Bankin***
Føroya Banki hevur havt ein stóran búskaparligan vøkstur tey seinastu árini. Samlaði javni bankans er 5 mia. kr., og eginpeningurin er 1,1 mia. kr.

Bankin hevur sera gott gjaldføri, uml. 1,7 mia. kr., sum eru sett í peninga- og lánsbrævamarknaðin.

***Starvið***
Fíggjarleiðarin hevur, við tilvísing til stjórnina, ta dagligu ábyrgdina av umsitingini av gjaldføri bankans, sum hevur ein stóran leiklut í samlaða rakstri bankans.

Fíggjarleiðarin fær ábyrgdina av at útbyggja støðu bankans innan íløgutænastur og kapitalumsiting, eins og hann fær ábyrgdina av at byggja upp støðu bankans í einum føroyskum kapitalmarknaði, sum arbeitt verður við at stovnseta.

Høvuðsábyrgdin av handlum á uttanlandsøkinum verður ætlandi eisini løgd til fíggjarleiðaran.

***Førleikakrøv***
Tað er ein fyritreyt, at fíggjarleiðarin hevur sannførandi praktiskar royndir í at umsita og handla virðisbrøv gjarna saman við viðkomandi teoretiskari útbúgving.

Umsøkjarin, sum væntast at kunna taka eina sjálvstøðuga ábyrgd av úrslitinum, skal gera sítt til at marknaðarføra og mynda bankan. Góð samstarvsevni eru ein fyritreyt.

***Treytir***
Setanartreytirnar verða avtalaðar eftir royndum og førleika hjá umsøkjara.

Starvið skal setast skjótast gjørligt men annars eftir avtalu.

***Umsókn***
Skrivlig umsókn saman við viðkomandi skjølum verður í seinasta lagi 27. mars 2000 at senda

Jørn Astrup Hansen, bankastjóra
P/F Føroya Banki
Húsagøta 3
FO-100 Tórshavn

har nærri upplýsingar kunnu fáast á telefon 31 13 50.

FØROYA BANKI

**Er Rás2 komin fyri at verða?**

**Ja, men treytin er undirtøka!**

**Hjá okkum ger hvør einstakur mun!**

**Vilt tú stuðla Rás2?**

**Afturfyri bjóða vit tær eitt frískt útvarp:**

- ❑ har lurtarin í størri mun enn leiðslan setir dagsskránna
- ❑ har tú sleppur framat og fært ávirkan
- ❑ har tað einki kostar at fylla runt ella at senda heilsu
- ❑ har tú fært atgongd til at luttaka í komandi eydnuspølum við t.d. uttanlandaferðum sum vinningum

**Tekna teg í eitt heilt ár sum stuðul fyri bert 250,- kr. íroknað MVG.**

**Tit kunnu stuðla og fáa atgongd til okkara útvarp sum omanfyri nevnt við at gjalda í minsta lagi 250,- kr. inn á konto 6460-1608489 og upplýsa navn, bústað og telefonnummar.**

**Rás 2 Sp/f**
**Hoyvíksvegur 61**
**Postrúm 3131**
**FO-110 Tórshavn**
**Tel. 35 99 99**
**Fax 35 99 90**

Rás 2 FM 102

Sosialurin - 311820

sosialurin
www.sosialurin.fo

**BILLUTIR**

**ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR**

**F.A. BILLUTIR**
tlf. 421605 fax 421666

**Heitlufts-aggregat til flest øll endamál**

- Refleks oljuovnar til bátin, summarhús o.a.
- Hoyggjturkarar til turkan av græsið - serframleitt til Føroysk viðurskifti!
- Gasovnar
- Hitakanónir
- Avfugtarir

*Vit útvega eftir tygara tørvi!*

*Tosið við okkum!*

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

fk

Original
bosal
Útstoyt



ES

**p/f Esmar Simonsen**
**Kambsdalur**
**FR-530 Fuglafjørður**
**Tlf. 444405**
**Fax444629**

**Ford Escort til sølu**



**Ár.:** 3 1/2
**Km.:** 82.000
**Litur:** Myrkagrønur
**Diesel**

Bilurin er ikki roykjarabilur, nýsproytaður, hevur sportsfelgur, vel og sóltak.

Boð undir kr. 100.000,- hava ongan áhuga.

*Tel. 315979 og 283061*

**TILBOÐ**

***Frá leygardegnum 11/3 til 18/3 lata vit:***

***÷10% av stálvaskum***



***÷20% av øllum kranum***

*Tilboðini eru eisini galdandi í Runavík teir dagar opið er.*
*Vit hava eisini stórt úrval av bæðirúmsmøblum.*

**VVS-HORNIÐ**
**Lágpríshandil**

Landavegur 2 - 100 Tórshavn - Tel. 318023 - Fax 310963
Runavík • Tel. 447773 *Opið:* Mikud.....13.00-17.30
Leygard. 10.00-14.00

Sosialurin - 311820

www.sosialurin.fo